# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Okkara átak í Georgia kann samanberast við tað, sum USA gjørdi aftan á 11. september í 2001*

*russiskur varaforsætisráðharri*

# Russar á veg úr Georgia

**Samstundis eru amerikanararnir farnir at flyta neyðsynjarvørur við flogfari til Georgia**



*Russisk hernaðarakfør uttan fyri Gori*
*Mynd: Polfoto*

Georgiska innanríkisráðið segði í morgun, at russiski herurin var farin undir at taka seg aftur úr georgiska býnum Gori, sum hevur verið undir russiskum eftirliti teir seinastu dagarnar.

Í gjár komu fleiri russisk hernaðarakfør til Gori. Russiska frágreiðingin var, at hermenninir skuldu verja fólkið í býnum, men georgisku myndugleikanrir søgdu tað vera skálkaskjól, og at Russland hevði brotið avtaluna um vápnahvíld.

Í morgun væntaðu eygleiðarar, at afturtøkan úr Gori var byrjanin til russiska afturtøku úr Georgia.

Eitt amerikanskt flutningsflogfar kom í morgun til Georgia við neyðsynjarvørur, og eitt annað skuldi koma seinni í dag.

# Ætla at halda Tsvangirai uttanfyri

**Í Zimbabwe royna stjórnin og misnøgdir andstøðupolitikarar at skipa stjórn uttan um andstøðuflokkin, sum vann tjóðartingsvalið í vár**

Fyrst ljóðaði, at suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, hevði fingið semju millum zimbabwisku stjórnina og politikarar, sum hava tikið seg úr andstøðuflokkinum MDC, men seinni avsannaði Mbeki tíðindini.

- Vit hava umrøtt øll viðurskifti og eru næstan komin á mál, men Morgan Tsvangirai, andstøðuleiðari, vil ikki góðtaka úrslitið og hevur biðið um stundir til at hugsa seg um, segði Mbeki í gjárkvøldið.

Suðurafrikanski forsetin, sum er semingsmaður í Zimbabwe, legði afturat, at hann er sannførdur um, at samráðingarnar fara at enda við semju, men at tað er ilt at siga, nær tann endaliga semjan verður veruleiki.

Sambært fleiri keldum vildi Morgan Tsvangirai ikki taka undir við semjuuppskotinum, tí sambært tí fekk andstøðuleiðarin ongan leiklut í zimbabwisku leiðsluni. Sum skilst miðjar uppskotið eftir, at stjórnarflokkurin og teir politikararnir, sum eru farnir úr MDC, skulu skipa stjórn uttan um sjálvan andstøðuflokkin, sum annars vann tjóðartingsvalið í vár.



*Robert Mugabe vil ikki lata andstøðuna sleppa framat*
*Mynd: Polfoto*

## Floksformaður skotin í USA

**Formaðurin hjá demokratunum í amerikanska statinum Arkansas varð myrdur í gjár**

Stutt fyri middag lokala tíð í gjár kom ein maður inn á skrivstovuna hjá demokratiska flokkinum í býnum Little Rock í Arkansas og spurdi eftir formanninum, Bill Gwatney. Løtu seinni skjeyt maðurin trý skot eftir floksformanninum, og í gjárkvøldið doyði Bill Gwatney.

Fyrrverandi forsetin Bill Clinton er ættaður úr Arkansas og var guvernørur har, áðrenn hann bleiv forseti, og tað vóru hann og Hillary Clinton, sum í gjárkvøldið boðaðu frá, at Bill Gwatney var deyður.

Drápsmaðurin er eisini deyður. Hann royndi at sleppa undan løgregluni, men í einum skoitbardaga við løgregluna varð hann so illa særdur, at hann doyði á sjúkrahúsinum í morgun, skrivar AP. Sambært løgregluni var drápsmaðurin 50 ára gamal og var vorðin arbeiðsleysur fyri stuttum.

## STUTT SAGT

### Rice til Georgia

Amerikanski forsetin, George W. Bush, hevur gjørt av at senda uttanríkisráðharra sín, Condoleezza Rice, til Georgia í næstum fyri at vita, um hon er før fyri at finna eina loysn á ósemjuni millum Russland og Georgia. Samstundis hevur Bush gjørt av at senda herskip og flogfør til leiðirnar við neyðsynjarhjálp til Georgia.

Í einari røðu í gjár segði Bush, at tað er sera umráðandi, at russar halda avtaluna við Georgia um vápnahvíld, og at teir taka sínar herdeildir aftur, so neyðhjálpin kann koma fram. Stutt frammanundan røðuni hevði Bush tosað í telefon við georgiska forsetan, Mikhail Saakasjvili.



*Condoleezza Rice skal til Georgia*
*Mynd: Polfoto*

### Goymdi barn í skápi

Herfyri bóru amerikanskir fjølmiðlar tíðindi um eina sjey ára gamla gentu, sum varð funnin í einum skápi. Sagt varð, at gentan brúkti bløðu, og at hon var sum eitt pinkubarn, tí hon hevði als ikki ment seg á sama hátt, sum børn vanliga gera. Eitt nú dugdi hon ikki at tosa ella at samskifta við onnur fólk.

Nú skriva bløðini, at gentan eitur Danielle Crockett og býr í , og at í veruleikanum bleiv hon funnin í býnum Plant City í Florida fyri trimum árum síðani. Bløðini vita at siga, at tvær ferðir fekk barnaverndin í býnum kærur frá fólki, sum vildu vera við, at gentan bleiv misrøkt. Kortini hendi einki, fyrr enn gentan var sjey ára gomul.



*Ein smágenta í Florida bleiv misrøkt í sjey ár*
*Mynd: AP*